Magnus á Dalbø til minnis

Tað fækkast í vinaskara, nú var tað so Magnus, ið átti tørn, einans 59 ára gamal.

Ikki vardi tað meg á nakran hátt, at so skuldi vera, tá vit hósdagin stóðu og prátaðu saman um mangt og hvat. Tú hevði góðar framtíðarvónir, nú skuldu tit bara halda frí og slappa av eitt ár frá gistingarhúsinum »Á Bakkanum« aftan á, at tú og Ingrid høvdu havt eina strævna tíð við at fáa alt at koyra og alt nú gekk nógv betur. Men mongum brestir ætlan.

Altíð var tað stuttligt at tosa við teg, tú hevði altíð onkra skemtisøgu at siga og dugdi væl at siga frá.

Vit hava ikki sæst so nógv hesi seinastu árini, ið tit hava verið í Vági, men altíð var tað sum um eingin tíð var gingin, tá vit hittust, tú var tann sami sum altíð.

Pápi og Magnus vóru góðir vinir og tað besta, ið pápa dámdi var at fara inn á gólvið at vitja Ingrid og Magnus, drekka kaffi, telva, práta um fótbólt. Har kendi hann seg heima og av tí sama havi eg altíð sæð Magnus sum ein góðan vin, vit hava sitið saman í nevndini hjá MB, skotið harur saman og tað vinarlagið hevur smittað yvir á Suna, son Magnusar. Eg kenni meg sum heima, tá eg siti inni hjá Suna og Anne á sama hátt sum pápi kendi seg heima hjá Magnus og Ingrid. Í '74 tá eg var nýútlærdur snikkari, arbeiddu eg og pápi Magnus, Absalon, saman í meira enn 1 ár og kom eg tá til at kenna henda heiðursmann væl. Absalon hevði sama blíða, men bestemta sinnalag sum Magnus, har var eingin slingur í valsinum, tað, ið teir høvdu at siga, varð sagt og harvið var tað. Har var eingin dupultmoralur. Magnus hevur roynt nógv í sinum alt ov stutta lívi. Hann hevur starvast á Skála Skipasmiðju, sum smiður og sveisari í smiðjuni hjá J. K. Joensen í nógv ár, seinni hevur hann eisini starvast sum timburmaður, havt pylsuvogn í Miðvági og nú tey seinastu árini sum hotelvertur og væl lá eftir hjá honum, hvat hann enn tókst við.

Eg minnist henda hósdagin, at hann tosaði um hvussu glaður hann var, at tað gekst børnunum væl her í lívinum. Tað verður ein stórur saknur hjá tykkum, nú Magnus ikki er her meira. Mátti Harrin styrkt tykkum, ið sita eftir við minnunum. Mátti Hann lagt ein kappa útyvir skelkin, óttan og máttloysið, so einans gleðin, ið var og minnini sita eftir.

Orð eru so fátøk, tá lagnan slær beinini undan einum og ein kennir hvussu stokkut tíðin veruliga er. Kom til hugs eina yrking, ið dóttir mín Jónley hevur skrivað:

Blóman

Nú kennir lítla blóman kuldan,
heystarkuldin harður er,
hon stendur millum túsund aðrar,
tó einsamalla kennir seg.

Hugsar bert um betri tíðir,
saknar heita summarið,
kennir hvussu tíðin flýgur,
hugsar um øll minnini.

Minnist tá alt fór at spíra,
minnist hvussu ung hon var,
síðan tó alt stóð í blóma,
so vakra tá hon kendi seg.

Nú er lítla blóman viknað,
høvur tungt at bera er,
skjótt man blóman finna friðin,
av mold hon komin, at mold hon fer.

Í djúpastu virðing og samkenslu við tykkum, ið mist hava tykkara elskaða mann, pápa, verpápa, abba, son og beiggja. Friður verið við minninum um Magnus á Dalbø.

Valdemar

Viðmerking:

Gullgáva frá samgonguni

Dagurin í gjár, tórsdagurin t. 30. mars, var merkisverdur dagur í løgtinginum. Við tveimum ymiskum lógaruppskotum samtykti fullveldissamgongan øðrumegin eina **avgjaldshækking** á brennioljuni, sum í mun til støðið í dag dýrkar kostnaðirnar hjá húsarhaldum, virkjum og skipum við einum 10 mió. kr. árliga, og hinumegin ein stórfingna **skattalækking** til privatu partafeløgini, sum eftir einum miðalárið gevur teimum einar 40 mió kr.

Til tess at royna at minka um avleiðingarnar av hesum høpisleysu tiltøkunum høvdu Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin tvey broytingaruppskot, men tey sópaði samgongan av borðinum. Tað áhugaverda var, at fyri at verja sína fólkaflokksstøðu í hesum málunum, vísti Tjóðveldisflokkurin í heilum til ta sonevndu »pappírsleysu semjuna«.

»Pappírsleysa semjan«

Fyri hálvum ári síðani bórust knappliga tey politisku stórtíðindi, at gjørd var ein sonevnd »pappírsleys semja« um eitt nýtt grundarlag fyri vinnupolitisku stevnuna hjá samgonguni. Teir sum høvdu lagt ráð saman, vóru tveir av landsstýrismonnunum í fullveldissamgonguni, tjóðveldismaðurin Høgni Hoydal og fólkafloksmaðurin Jørgen Niclasen.

Henda søguliga semjan kom óvart á øll, eisini summar samgongumenn — m.a. var (tann valdi) formaðurin í Tjóðveldisflokkinum ein teirra, íð segði seg vita av ongum.

Semjan hevði 3 tættir:

1) Tær 40 mió.kr, sum í fleiri ár høvdu verið settar av til stuðul til endurnýgging av skipaflotanum, skuldu nú nýtast til onnur endamál, m.a. til skattalækkingar.

2) Fiskirættindini skuldu gerast meira handilsliga umsetilig.

3) Partafelagsskatturin skuldi lækkast úr 27% niður í 20%.

Viðv. 1) skattalækkingum eru higartil 2 tiltøk sett í verk: Eftir uppskoti hjá Javnaðarflokkinum er barnafrádrátturin øktur við uml. 9 mió.kr. árliga, og eftir uppskoti frá landsstýrinum verður nú botnfrádrátturin hjá pensjonistum hækkaður við eini upphædd svarandi til uml. 10 mió.kr. árliga. Hinar 21 mió. eru so ætlaðar at fáa gongd á ta privatu eftirlønartryggingina, fólkatryggingina, sum landsstýrið ætlar at seta verk.

Viðv. 2) eru ikki nakrar broytingar enn farnar fram í lógini um vinnuliga fiskiskap, men har vita øll at so sum lógin verður umsitin av landsstýrismanninum, so verður hon toygd og tambað so langt tann handilsliga vegin, at man undrast á, hvat ein lóg kann brúkast til.

Viðv. 3) er at siga, at tað er so einasti táttur í »pappírsleysu semjuni«, har komið er á mál: samgongan samtykti í løgtinginum í gjár at seta partafelagsskattin niður við einum fjórðingi, úr 27 niður í 20%.

Brennioljuavgjaldið hækkað

Í tinginum í gjár var til triðju og endaligu viðgerð uppskotið hjá landsstýrinum at seta brennioljuavgjaldið fast til 80 oyru liturin. So sum oljuprísirnir hava verið seinastu 4-8 vikurnar, merkir hetta at oljuavgjaldið verður hækkað við uml. 10 oyru liturin. Við hesi hækkingini fær fullveldissamgongan nú lagt uml. 80 mió. kr. í landskassan, so sum roknað er við í fíggjarlógini. Javnaðarflokkurin og Miðflokkurin settu broytingaruppskot fram um at lækka oljuavgjaldið til 60 oyru liturin, tvs. 10 oyru minni enn tað er nú. Hetta hevði givið 20 mió. kr. minni í lands-kassan, enn uppskotið hjá landsstýrinum. Men sum sagt sópaðu samgongutingmenn hetta av borðinum.

Viðvíkjandi partafelagsskattinum er tað jú eitt av hjartamálunum hjá fólkaflokkinum. Tað er jú eisini tikið beinleiðis eftir uppskriftini hjá Caragata.

Bæði til 1. viðgerð, 2. viðgerð og nú til 3. viðgerð stríddist Javnaðarflokkurin harðliga ímóti hesum uppskotinum um henda velduga skattastudningin til privata vinnulívið. Fyrst og fremst tí, at tað ikki gagnar tí, sum sigst at verða endamálið: at stimbra eini endurnýgging av skipaflotanum. Hetta hevur Javnaðarflokkurin grundgivið við at vísa á, at tað er fiskivinnan sum fær tann allar minsta partin av slíkari skattalækking.

Vinnuskattastudningur til fíggjarstovnar og handilsfyritøkur

Vit hava út frá 1997-tølunum víst á, at ein slík lækking av PF-skattinum gevur privatu partafeløgunum eina skattalækking upp á **38 mió. kr**. Millum tær ymisku vinnurnar verður býtið av hesum skattalætta soleiðis:

1) Peninga-, tryggingar- o.a. fíggjarstovnar: 22 mió kr. (t.e. 58%),

2) Handilsfyritøkur: 7 mió. kr (t.e. 17%)

3) Fiskivinna (á sjónum): 2 mió. (t.e. 6%)

Tær 7 mió., íð eftir eru, eru smábyttar millum allar hinar vinnurnar.

Eitthvørt tos um at hetta skal stimbra til eina endurnýgging av skipaflotanum er burturvið. Men til tess at bøta um ørskapin hjá samgonguni setti Javnaðarflokkurin, saman við Miðflokkinum, tí fram eitt broytingaruppskot í gjár.

Vit søgdu: Okey, tit vilja lækka PF-skattin, og tit hava meirilutan til at trumfa tað ígjøgnum. Men hví skulu bankar, sparikassar, tryggingarfeløg og aðrir fíggingarstovnar hava henda velduga skattastudningin ??? Hesir, har inntøkurnar floyma í kassan í stríðum streymum ? Lat hesar framvegis gjalda teirra 27%, og seti so bara allar hinar niður á 20% ! Tað er hóast alt frægari at liva við!

Men nei. Eisini hetta uppskotið varð sópað av borðinum. Samgongan avgjørdi, at eisini bankarnir, sparikassarnir, tryggingarfeløgini o.a. fíggingarstovnar, teir sum eiga 50-60 % av øllum PF-skattinum, skulu hava hesa gullgávu frá Føroya fólki. Ein av ítarstu forsprákarunum fyri hesum var landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal. Hansara grundgeving var, at við hesi lækkingini av PF-skattinum gjørdist vinnulívið betur ført fyri at átaka sær øktar samfelagsligar skyldur, av vælferðini hjá fólkinum, av sjúkradagpengum, at geva teimum betri løn, betri eftirløn, betri arbeiðsumhvørvi o.m.a. gott. Eisini peningastovnar o.t. Teir hava kanska ikki havt ráð til tað frammanundan.

Men er tað nakar annar enn Høgni Hoydal, íð veruliga trýr uppá, at arbeiðsfólkið nú fer at fáa meira í løn og betri kor, tí at partafeløgini - harav fyrst og fremst fíggjarstovnarnir - sleppa so nógv bíligari í skatti, at teirra skattarokning minkar við einum fjórðingi ? Hetta framlegði hesin góðu maður so sum ein av aðaltáttunum í tí nýggja vinnulívspolitikkinum hjá samgonguni.

Hans Pauli Strøm,
javnaðartingmaður

Trupulleiki sum er lættur at loysa

Vit sóu í sjónvarpinum hóskvøldið eitt av yvaleyst fleiri dømum um fólk, sum ikki hava tak yvir høvdið. Í hesum førinum var talan um eina mammu við trimum børnum, sum ikki hevði annan íbúðarmøguleika enn eitt kamar á Sjómansheiminum. Ein sera vánalig loysn bæði fyri mammuna og børnini, fyri samfelagið og so er Sjómansheimið ikki júst ætlað at nøkta ein tílíkan tørv.

Tað, sum tey í øðrum londum kalla íbúðarpolitikk, finst ikki í Føroyum. Her hevur tað verið so, og er tað framvegis, at kommunur ella privatir jarðaeigarar hava stykkjað út til grundstykkir, sum fólk síðani hava bygt síni hús á. Serliga tey seinastu árini hava eisini privatir byggimeistarar ognað sær lendi, bygt m.a. raðhús og sambygt hús og hvat alt eitur, og alt gott um tað. Frálík hús, ómakasleyst hjá fólki sum ynskja at búgva soleiðis, og væl at merkja eisini ynskja at brúka ein so mikið stóran part av síni inntøku til býli. Á hendan hátt kann **íbúðartørvurin** loysast, men ikki í øllum førum **íbúðarneyðin**.

Sum høvuðsstaður er Havnin í teirri støðu, at fjøld av fólki koma higar í eitt styttri tíðarskeið, m.a. í samband við útbúgving. Tey hvørki keypa grundstykki ella hús fyri millónini ella meira. Tað eru eisini tey, sum ikki hava ráð at seta seg fyri milliónini, onnur hava ikki brúk fyri eini tílíkari loysn, og so kunnu aftur vera onnur, sum als ikki hava hug at nýta ein so stóran part av síni inntøku til býli, sum er ein skuldarbinding fyri ein stóran part av lívinum.

Er politiskur vilji, er lætt at loysa bæði íbúðartørvin og íbúðarneyðina. Í fyrsta lagi krevst, at vit skipa ein íbúðarpolitikk, sum gevur møguleika fyri alternativum íbúðarloysnum. Vit kunnu kalla hesar eigaraíbúðir, leiguíbúðir ella hvat vit vilja. Hetta kann millum annað gerast í samstarvi millum land, kommunu og eitt nú Íbúðargrunnin. Við eini tílíkari loysn kunnu vit geva fólki eitt alternativ til verandi íbúðarmynstur. Ein møguleika, sum mong hava tørv á. Íbúðartørvurin kann lættliga loysast við verandi skipan. Íbúðarneyðina loysa vit ikki uttan við einum politiskum vilja at fremja ein íbúðarpolitikk við alternativum íbúðarloysnum.

Tórfinn Smith,
býráðslimur

Betri svøvn

BIOflex magnetviðgerð tí:

- BIOflex magnetviðgerðin er avgjørt tann besta magnetviðgerðin í verðini!
- BIOflex hevur prógvað ávirkanina við dupultari blindtest!
- BIOflex hevur 100 ferðir størri ávirkan enn líknandi vørur!
- BIOflex er góðkent sum heilsuútgerð!
- BIOflex hevur víst, at yvir 92 % verða pínufrí og øll sova betri!

Vøran er testað á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn.

Sosialurin - 311820

Ring 21 79 16

Magnetviðgerð er tað nýggjasta innan pínuviðgerð - og júst BIO flex undirdýnan, sum er vard við einkarrætti í allari verðini, hevur víst, at 92 % verða pínufrí. Vello Føroyar veitir tær aftursendingarrætt í 5 vikur, tá dýnan hevur verið brúkt í minst 3 vikur.



Viðgerð, ið virkar ímóti:

- Øllum slagi av pínu
- Vøddastívleika
- Trupulleikum við svøvni
- Órógv í blóðrenslinum
- Einastandandi fyri ryggjatrupulleikar

BIOflex® MAGNET TERAPI

Vello Skandinavia Sp/f hevur síðani 1989 selt fleiri enn 25.000 BIOflex viðgerðir í Danmark og virkið hevur framhaldandi framgongd við viðgerðini. BIOflex er best á marknaðinum innan magnetiska viðgerð.

Nærri upplýsingar ella faldari fæst hjá: **Vello Føroyar**
Boks 354 - FO-700 Klaksvík • Tlf: 217916 - Fax: 457916

Klaksv kar Sj manssk li

Œ august 2000 byrja hesi skei :

Skipskokkaskei :

tb gvingin gevur ¿ktan f¿rleika at virka sum skipskokkur f¿royskum fiskiskipi.

Kokka tb gvingin leggur m.a. dent , at n mingar l ra f¿ slul ru og reinf¿ri, at proviantera, matger a og bor rei a.

Œ l rut ini ver a skei tikin innan trygd og fyrstuhj lp.

Skei i var ar 20 vikur. Ongar uppt¿kutreytir eru til at sleppa inn.

Sj vinnuflokkur:

Vi hesum skei i f st atgongd til framhaldandi lestur til heimaskipara, um tygum eisini hava ta ney ugu siglingart ina. N rri uppl singar hesum vi v kjandi f ast vi at venda s r til sk lan.

M¿guleiki ver ur eisini at taka dugnaskapar-skei sigling, i gevur r tt til at f¿ra skip upp til 100 tons t 30 fj ringar r landi.

Œ l rut ini ver a skei tikin innan trygd og fyrstuhj lp.

Skei i var ar 20 vikur. Ta eru ongar uppt¿k-utreytir til at sleppa inn kokkask lan.

Ums knarbl¿ f ast vi at venda s r til sk lan tlf. 456128 fax. 457917 ella telduposti: klaknav@klaknav.fo Eisini kunnu tit vitja heimas u okkara: www.klaknav. fo

SPF Teldu Tænastan
www.tt.fo

Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Hevur tú pínu?

BIOflex hjálpir sjálvt ringastu pínuni!

BIOflex magnetviðgerðin hjálpir m.a. móti:

- Tennisalboga
- Koyrilsbresti
- Akslapínu
- Ryggjapínu
- Knæpínu
- Øklapinu
- Liðapínu

Sosialurin - 311820

Magnetið verður klistrað á pínustaðið og byrjar at virka beinanveg. Eftir heilt fáum døgum kennist munandi betring. Magnetini fáast í ymiskum støddum. Ring og fá meira at vita frá:

Vello Føroyar
Boks 354 - FO-700 Klaksvík
Tlf: 217916 - Fax: 457916

BIOflex® MAGNET TERAPI

Kollafjarðar Bókasavn

3. fyrilestrarkvøldið um Miðgerðaættina verður í Kollafjarðar Skúla hóskvøldið 6. apríl kl. 19.00

Tikið verður saman um tey seinastu 100 árini við frágreiðingum, søgum, frásagnum og arbeiðsumstøðum.

Eisini verður drekkamuður.

Kollafjarðar bygdarsavn, Fornminnafelagið í Kollafirði og Kollafjarðar Bókasavn

Lesið sosialin

FARTELEFONIR

GSM
NMT 450 - NMT 900
Tráðleysar telefonir o. a.

Ymisk merki, so sum:

MOTOROLA
ERICSSON
NOKIA Connecting People
PHILIPS
BENEFON

SØLA & TÆNASTA

Storno
Handan Á 6 - 100 Tórshavn
Tel. 314414 - Fax 318045